## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig. Um kvøldið veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av landsynningi, men framvegis turt.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi, seinnapartin kanska skrið av útsynningi. Ælingur, men kanska onkur sólglotti. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, týsdagin minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 7 og 11 stig.

# Reisigildi í Kvívík

**Hósdagin varð nýggi parturin av skúlanum í Kvívík reistur. Farið er undir stórar útbyggingar av skúlanum, sum verða lidnar í august næsta ár**

ÚTBYGGING
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



*Kvívíkar skúli verður nú út- og umbygdur. Reisigildið varð hildið hósdagin, og eftir ætlan skal skúlin verða liðugur í august næsta ár*

**Kvívík:** Í august mánaði næsta ár fáa skúlabørnini í Kvívík munandi betri umstøður. Í løtuni verður skúlin nevniliga útbygdur soleiðis, at karmarnir verða nøktandi bæði hjá lærarum og næmingum.

Og hósdagin varð nýggi parturin av skúlanum reistur. Í nýggja partinum skulu vera fýra skúlastovur, alisog evnafrøðistova, lærararúm, serstova, og í kjallaranum vera smíðstova og evningstova. Harumframt verður eisini nýggjur køkur.

Sum er í løtuni, hevur skúlin bert tvær skúlastovur, sum næmingarnir flyta ímillum. Til dømis situr fyrsti flokkur inni í smíðstovuni, so umstøðurnar eru ikki av teimum bestu.

### Umbyggja eisini

Eisini verandi skúlin verður umbygdur. Allir veggirnir verða tiknir niður, og hann verður gjørdur til eitt stórt bókasavn og teldurúm.

– Vit hava ikki havt eitt rættiligt teldurúm fyrr, og bøkurnar hava ligið allastaðni. Nú verður alt savnað á einum staði, sigur Heini Holm, borgarstjóri í Kvívík.

Eisini verður ein tónleikastova, og møguleiki verður eisini fyri forskúla.

Kostnaðurin á út- og umbyggingini liggur um 16 mió krónur, sum eru deildar yvir trý fíggjarár. Tá skúlin er liðugur liggur skuldin hjá kommununi á fýra mió krónum.

Í Kvívíkar skúla ganga millum 50 og 60 børn upp til 7. flokk.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 15 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 28 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 26 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 987 hPa. yvir Norðsjónum fer spakuliga í landnyrðing og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1008 hPa við Ísland stendur mestsum í stað og dýpist nakað.




Eitt lágtrýst í útsynning vestan úr Írlandi fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin við vindi og regni.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/06 kl. 06[00]– 24/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 8,9°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 23/06 kl. 06[00]–24/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 76,1 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

26. juni: Fyrra kvarter
1. juli: Mánin næstur jørðini
2. juli: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. juni | 00.35 | 13.15 | — | 12.15 | — | 12.30 | 02.35 | 15.15 | 03.35 | 16.15 | 11.30 | 23.55 | 10.30 | 22.55 | 00.50 | 13.30 | 01.50 | 14.30 | 00.20 | 13.00 | 01.35 | 14.15 |
| 26. juni | 01.40 | 14.23 | 00.40 | 13.23 | 00.55 | 13.38 | 03.40 | 16.23 | 04.40 | 17.23 | — | 12.38 | 11.38 | — | 01.55 | 14.38 | 02.55 | 15.38 | 01.25 | 14.08 | 02.40 | 15.23 |
| 27. juni | 02.48 | 15.06 | 01.48 | 14.06 | 02.03 | 14.21 | 04.48 | 17.06 | 05.48 | 18.06 | 01.03 | 13.21 | 00.03 | 12.21 | 03.03 | 15.21 | 04.03 | 16.21 | 02.33 | 14.51 | 03.48 | 16.06 |
| 28. juni | 03.31 | 15.52 | 02.31 | 14.52 | 02.46 | 15.07 | 05.31 | 17.52 | 06.31 | 18.52 | 01.46 | 14.07 | 00.46 | 13.07 | 03.46 | 16.07 | 04.46 | 17.07 | 03.16 | 15.37 | 04.31 | 16.52 |

ÚF

### Morgunlestrar
**28. juni–3. juli**

***Rólant Lenvig í Havn lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 28. juni:**
nr. 268 At dimmið ofta veldið fekk

**Týsdagin 29. juni:**
nr. 271 Eg fátækur snúgvi mær, faðir
nr. 230 Hægstur heilagur andi

**Mikudagin 30. juni:**
nr. 328 Hesin er dagurin, Guð hevur sett

**Hósdagin 1. juli:**
nr. 462 So víða um lond sum sólin hon sær
nr. 407 Jesus góði, ver tú mín

**Fríggjadagin 2. juli:**
nr. 277 Guð, eftir tær mær leingist

**Leygardagin 3. juli:**
nr. 157 Hoyra tit, at Harrin kallar
nr. 61 Í Harrans hondum eri eg

## TIPS 13 úrslit
**Vika 25 – 19.–23. juni**
**Vika 25 – 19.–23. juni**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Letland–Tyskland | X |
| 2. | Holland–Tjekkiet, 1. halvl. | 1 |
| 3. | Holland–Tjekkiet | 2 |
| 4. | Spanien–Portugal, 1. halvl. | X |
| 5. | Spanien–Portugal | 2 |
| 6. | Rusland–Grækenland | 1 |
| 7. | Schweiz–Frankrig | 2 |
| 8. | Kroatien–England | 2 |
| 9. | Italien–Bulgarien | 1 |
| 10. | Danmark–Sverige, 1. halvl. | 1 |
| 11. | Danmark–Sverige | X |
| 12. | Holland–Letland | 1 |
| 13. | Tyskland–Tjekkiet | 2 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | **89.531,- kr.** |
| 12 røtt: | **1.785,- kr.** |
| 11 røtt: | **193,- kr.** |
| 10 røtt: | **31,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**Vika 26 – 23. juni**
Vinnaratøl: **17 - 24 - 25 - 27 - 41 - 45**

Eykatøl: **04 - 44**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **Eingin vinnari** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **106.781,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **3.638,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **120,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **39,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

www.sosialurin.fo